# kivinnuna

klára seg í kappingini. Tað er ikki nøgdin av fiski og støddin av inntøku frá fiskivinnuni, sum drívur verkið. Tað, sum um ræður, er at brúka so lítið av arbeiðsorku og so lítið av kapitali sum gjørligt til at fiska og tilvirka, at arbeiðsorka og kapitalur kann fara í aðrar vinnur. Tí lata vit í seinna myndlinum eisini tøknina gera innrás á fiskavirkið, sum endar sum eitt hátøkniligt dekk í skipinum.

## Kymilig tillaging

Tveir ymiskir myndlar, sum geva hvør sína niðurstøðu?

Nei, ikki heilt.

Mistakið vit gera, er at brúka ein skammstundar myndil til at gera fjarstundar niðurstøður burtur úr. Í búskaparfrøði brúka vit skammstundar konjunkturmyndlar – sum fyrra myndilin – til at gera niðurstøður um konjunkturfyribrigdi. Og so brúka vit fjarstundar myndilin til at gera niðurstøður um varandi bygnaðin av samfelagsbúskapinum.

Tú smíðar ikki marknaðarligu karmarnar um vinnuraksturin eina ferð um árið. Tað skal vera varandi verk – so varandi sum mannaverk nú einaferð eru. Tí smíða vit karmarnar eftir seinna myndlinum, har kymilig tillaging til tøkniligan framburð og broytt marknaðarkor eru avgerandi.

## Skeivur leistur

Føroysk fiskivinnulóggáva er, eins og ein stórur partur av vinnuligari siðvenju og lóggávu annars, smíðað eftir skeiva leistinum.

Politikarar og fyrisiting dreiva enn í fjøruni í gamla myndlinum og stúra fyri hvussu tað skal ganga reiðarínum og fiskavirkinum, tá alt rekur ímóti. Teir laga tryggar verjugarðar rundan um fiskivinnuna, so at hon ikki skal forfarast í stormi.

Teir tryggja hvørjum siglandi skipi sín part av veiðuni, so at hvør einstøk bygd hórar undan, sjálvt um illa veit við. Manning og fiskafólk skal hava inntøku úr almenna kassanum, um lítið er at tjena, so at alt samfelagið ikki steðgar upp í ringum tíðum. Ferð eftir ferð verða illa fyrikomin skip og virki bjargað við almennum fæ, so einki ilt skal henda bygdafólkinum.

Bann verður sett at virka fisk umborð, so at virkið framhaldandi skal hava tilverurætt. Av somu ávum verður bann sett at selja ov mikið av fiski uttanlands.

Tað sleppur ikki hvør Hanus og Janus at troðka seg fram at í fiskaríi, tí nú eru stertarnir einaferð býttir so kristiliga eftir onkrum snediga hugsaðum leisti.

Og sum hetta korthús er lagað upp, ber ikki til at lata útlendingar sleppa at keypa seg inn í vinnuna. Av tveimum grundum. Partvíst tí at so fara útlendingarnir av stað við profittinum, sum annars skal lívga okkurt hús í bygdini. Og partvíst tí at tað er ógemeina ringt hjá tí almenna at forsvara, um tað skal til at bjarga útlendskari ogn við almennum fæ, tá illa vil til. Sjanneit?

## Uppsteðgaður motorur

Menúrslitið er, at vit hava avlívað alt sum eitur tøkniliga og marknaðarliga tillaging í fiskivinnuni.

Fiskivinnan er í so máta avgerandi drívkraftin í føroyskari vinnumenning. Tað er í henni, at størsta kraftin til samfelagsliga menning er komin, akkurát tí at hon hevur í hundrað ár ment seg tøkniliga og marknaðarliga. Síðani Ráfiskagrunnin í 1975 og fram til lógina um vinnuligan fiskiskap í 1996, hava vit spakuliga – men effektivt – tikið lívið av samfelagsligu drívkraftini í fiskivinnuni.

Motoruin er uppsteðgaður.

Tað kann so væl vera, at alt gongur upp á stás innan fyri verjugarðin í fiskivinnuni, men sum samfelagslig drívkraft er fiskivinnan púrasta uppsteðgað.

Fyrr enn vanlig marknaðarlig kapitalisma er fingin at virka aftur í fiskivinnuni, verða vit liggjandi fyri íla.

## Fiskakrónan

Føroyar hava ikki egið gjaldoyra. Vit brúka donsku krónuna, sum er so tætt heft at evropeisku evruni, at vit saktans kunnu kalla gjaldoyrað evru.

Men upp á ein máta hava vit kortini eitt serligt føroyskt gjaldoyra. Vit kunnu kalla tað eina "fiskakrónu", tí av útflutningsinntøkum okkara, telur fiskur meira enn helvtina.

Fyri hvørja krónu vit útflyta, kunnu vit keypa fyri eina krónu av innflutningi.

Tess minni av landsins tøka tilfeingi av arbeiðstímum, vit brúka til at framleiða fyri eina krónu av útflutningi, kann man siga at føroyska gjaldoyra styrkist mótvegis útlendska gjaldoyranum. Tess meira kunnu vit innflyta fyri hvønn arbeiddan tíma. Og tað vil uppaftur siga, at tess effektivari øll vinna er – men serliga fiskivinnan – tess sterkari er føroyska krónan. Fiskakrónan, altso.

Tað ræður tí ikki mest um at framleiða so nógvan útflutning sum gjørligt, men heldur um at framleiða útflutningin so effektivt sum gjørligt. At framleiða hann við so lítlum kostnaði av arbeiðstímum sum gjørligt.

Og í so máta er tað ikki so áhugavert, hvat tað er, sum vit útflyta. Bara tað gevur so nógvar krónur sum gjørligt fyri hvønn arbeiðstíma.

Man kann tí eisini siga, at galdandi fiskivinnulóggáva ger serføroyska gjaldoyrað veikari.

## Falløxin góða

Fáa vit ikki marknaðarligar reglur inn aftur í fiskiskap, og fáa vit ikki brotið niður aftur verjugarðarnar rundan um verandi reiðarí og virkir og sett beinharðar kappingarreglur í gildi, so slóknar avgerandi motorurin í búskapinum.

Píska vit ikki føroyskar fiskivinnufyritøkur til at vinda so nógv burtur úr fiskinum, sum til ber, so forkoma vit øllum búskaparligum framburði í landinum.

Tøknilig menning hendir ikki av sær sjálvari. Undir kapitalismuni er bert ein máti at fáa fyritøkurnar at kýta seg til at gera sítt allar, allar besta. Og tað er beinhørð og eirindarleys kapping. Gert tú stór mistøk og sovnar við stýrisvørlin í fyritøkuni, so skal konkurslógin sum falløxin kvetta høvdið av tær.

Bara upp á hendan mátan fáa vit tøkniliga menning til at gagnnýta hvønn evarska lítla proteinstrong úr fiskinum. Bara upp á hendan mátan fáa vit ein fiskiskap og eina fiskivinnu, sum skapar framburð og styrkir gjaldoyrað.

## Skommin er okkara

Tað er skomm at hoyra stjóran í Kovanum gremja seg um, at føroysk reiðarí ikki fáast til at taka livur og rogn úr fiskinum. Ikki hansara skomm, men okkara skomm. Tí vit hava skipað eina steinsovnaða fiskivinnu, sum nemliga ikki kýtir seg til at vinda hvørt tað einasta snikuta DNA úr fiskinum.

Tað er skomm at hoyra stjóran í Kjølbro snara og snúgva sær undan at svara, um Røkke ikki eigur skipið, teir fiska við. Ikki hansara skomm, men okkara skomm. Tí vit hava sett bann fyri, at útlendskur kapitalur sleppur at draga orku, tøkni, management og marknaðarsnildir inn í føroyska fiskivinnu.

Tað er skomm at hoyra reiðaríini gremja seg um at fiskidagarnir minka. Ikki teirra skomm, men okkara. Tí vit hava gyrt verandi skip inni í eini gyrðing, sum meira er at kalla pedagogiskur barnagarður enn modernað, beinhørð og eirindaleys kapitalisma. Teir skulu ikki gremja seg um nakað sum helst, men spentir fara til verka at draga so nógvar fiskidagar undan hvørjum øðrum, sum gjørligt. Til hinir liggja sperdir eftir á, tí at tú vart snildastur, treiskastur, mest óræddur, best fíggjaður, best rikin og mest fanansaktigur.

Tað er ikki bara skomm, men katastrofal skomm, at politikararnir hava skotið trupulleikan út til 2018 og saltað málið í nevndarkaggan.

Tað hevur ongan týdning um flokkarnir eru loysinga- ella sambandsflokkar. Tað hevur ongan týdning um teir eru sosialdemokratiskir ella borgarligir. Tí samfelagið er og verður kapitalistiskt. Undir danskari krúnu ella sum sjálvstøðug tjóð.

Fáa vit ikki púra ráa marknaðarliga kapitalismu inn í fiskivinnuna, dragnar bara alt meira millum okkum og onnur lond. Og tað eru vit, sum verða eftirbáturin.



- Hetta er ein illusjón. Ein nasjonal misskiljing av samanhanginum. Tað, sum vit av sonnum áttu at lært av myndlinum er hetta, at tað er fiskivinnan, sum sendir skelkir av konjunkturum gjøgnum samfelagið, sigur Hermann Oskarsson

Tekning: Hermann Oskarsson



